UTTAN ÚR HEIMI

## Krígsbrotsmaður tikin

Fyri fimm árum síðani ákærdi krígsbrotsmannadómstólurin í Haag bosniasewrbiska herovastan Milan Lukic fyri at hava framt krígsbrotsverk undir borgarakrígnum í Bosnia, men hann var ikki at finna nakrastaðni. Men í gjár kunngjørdu myndugleikarnir í Argentina, at teir vóru komnir fram á Milan Lukic í miðbýnum í Buenos Aires, at hann var tikin.

Milan Lukic stóð á odda fyri einari bosniaserbiskari herdeild, sum vanliga gekk undir heitinum "Hevnararnir", og krígsbrotsmannadómstólurin vil vera við, at menn hansara beindu fyri minst 20 muslimum á markinum ímillum Serbia og Bosnia í 1993.

Fyrr í ár dø'mdi ein serbiskur dómstólur fyrrverandi herovastan 20 ára fongsul fyri at hava burturflutt 16 muslimar har eysturi í Bosnia í 1992. Nú verður hann væntandi fluttur til Haag, so hann kann koma fyri krígsbrotsmannadómstólin har, skrivar AP.

## Clinton eftir barnafiti

Fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton fer nú í hernað ímóti barnafiti. Sum smádrongur hevði Clinton stórar trupulleikar av fiti, og hann ásannar, at tað hevur verið medvirkandi til avgerðina um at fara í hernað ímóti hesum trupulleikanum.

Ein kanning, sum lærdi stovnurin Emory University hevur gjørt, vísir, at ein fjórðingur av útreiðsluvøkstrinum í amerikanska heilsuverkinum tey seinastu 15 árini kemst av fiti, og tí hevur hann sett sær sum mál at venda gongdini innan fimm ár.

Bill Clinton sigur, at børnini skulu eta sunnari mat, og at tey skulu íðka meiri ítrótt. Tí mælir hann skúlunum til at banna ósunnum mati og at leggja størri dent á fimleik og ítrótt.

Herfyri fekk Clinton tvær skurðviðgerðir orsakað av hjartatrupulleikum. Sjálvur sigur hann, at hetta fekk hann at hugsa seg betur um, og í dag etur hann sunnari mat, og harafturat rennur hann hvønn morgun.

## Hópdrápsmaður funnin

Løgreglan í Ukraina hevur tikið ein 53 ára gamlan mann, sum hevur viðgingið, at hann hevur beint fyri minst 30 ungum gentum í Ukraina og grannalandinum Russlandi tey seinastu 30 árini.

Løgreglan fekk illgruna til mannin, tá ein tíggju ára gomul genta bleiv funnin myrd herfyri, og tá løgreglumenninir rannskaðu húsini hjá manninum, komu teir fram á ymsar lutir við nøvnunum á fleiri horvnum gentum. Løgreglan sigur, at fyribils hevur hon prógv fyri, at maðurin hevur myrt átta gentur, men at tað endaliga talið helst verður nógv størri.

Sambært løgregluni hevur maðurin ikki sagt, hví hann beindi fyri gentunum, men hann hevur greitt nágreiniliga frá, hvussu hann rændi genturnar, og hvussu hann beindi fyri teimum. Fyri seks árum síðani avdúkaði ukrainska løgreglan ein annan hópdrápsmann. Hann bleiv dømdur lívlanga fongsulsrevsing fyri at hava beint fyri meiri enn 40 fólkum, skrivar AP.

## Gjørdu kvetti

Eitt mistak á heimasíðuni hjá norska flogfelagnum SAS Braathens gjørdi, at 260 fólk hava kunnað sær ferðaseðil í businessflokkinum úr Oslo til Shanghai fyri einans 1200 norskar krónur, skrivar Adresseavisen.

Mistakið kostar flogfelagnum meiri enn sjey milliónir krónur, tí ein tílíkur ferðaseðil eigur at kosta 30.000 krónur. Leiðslan í felagnum umhugsaði at ógilda ferðaseðlarnar, men valdi kortini at góðtaka mistakið.

Talsmaðurin hjá SAS Braathens, Knud Løvstubben, sigur við Adresseavisen, at áhugin fyri teimum bíligu ferðaseðlunum var so stórur, at eftir minni enn trimum tímum høvdu 260 fólk verið á heimasíðuni og tryggjað sær eina bíliga ferð til Kina.

# ST-embætismenn svikað fyri milliónir



*Benon Sevan hevði ábyrgdina av olju fyri matskipanini. Nú er hann skuldsettur fyri at hava stungið pengar í egnan lumma*

*Mynd: Reuters*

**Týðandi embætismenn hjá ST gjørdu sær dælt av skipanini, tá ST gav Irak loyvi at selja olju, so landið kundi keypa mat og heilivág fyri pengarnar**

ST
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyrst kom ein serlig kanningarnevnd hjá ST til ta niðurstøðu, at Benon Sevan, sum hevði ábyrgdina av olju fyri mat-skipanini, hevði stungið 900.000 krónur í egnan lumma. Síðani bleiv næsti maður hansara, Aleksander Jakolev, skuldsettur fyri at hava gjørt tað sama. Í hansara føri var talan um slakar seks milliónir krónur.

- Kanningarúrslitið er skelkandi og hugstoytandi, tí tað er eingin ivi um, at ábyrgdarmenninir gjørdu sær dælt av skipanini við egnum vinningi fyri eyga, segði formaðurin í kanningarnevndini, fyrrverandi amerikanski tjóðbankastjórin Paul Volvker.

Benon Sevan hevur ikki játtað seg sekan, men tað gjørdi Aleksander Jakolev í gjár. Tann 52 ára gamli russarin játtaði at hava tikið ímóti pengum í trimum førum, meðan hann arbeiddi við olju fyri matskipanini. Kanningarnar hava víst, at hann tók ímóti pengum frá stórum amerikonskum fyritøkum, sum vildu sleppa at selja stýrinum hjá Saddam Hussein vørur.

Kofi Annan, ST-aðalskrivari, hevur tikið diplomatiska órinið frá Jakolev, so hann kann koma fyri rættin í USA. Verður hann dømdur sekur, kann hann fáa upp í 20 ára fongsul, skrivar Reuters.

### Úr irakskum skjølum

Skipanin, sum loyvdi Irak at selja olju, so landið kundi fáa pengar til at keypa mat og heilivág fyri, kom í gildi í desember í 1996. Í sínum arbeiði hevur kanningarnevndin hjá ST fingið skjøl frá iraksku stjórnini, sum vísa, at stýrið hjá Saddam Hussein misnýtti skipanina.

Sambært kanningarnevndini fekk Saddam sjálvur fleiri milliardir dollarar burtur úr skipanini, og ein part av pengunum brúkti hann til at mutra embætismenn, ráðharar og politiskar flokkar í meiri enn 40 londum. Sambært frágreiðingini tóku umleið 1300 fólk ímóti pengum frá stýrinum í Bagdad.

### ST viknað

Sjálvt um tað ikki er endaliga staðfest, at Benon Sevan er sekur í sviki, eru eygleiðarar á einum máli um, at avdúkingarnar hjá kanningarnevndini hava gjørt ST veikari, og nú verður bíðað í spenningi eftir teirri næstu frágreiðingini. Hon skal lýsa, um Kofi Annan sjálvur hevði nakað við svikið at gera, ella um hann visti um tað. Tað er komið fram fyrr, at ein sonur aðalskrivarans var uppi í svikinum, men kanningar, sum eru gjørdar fyrr, kundu ikki staðfesta, at aðalskrivarin var vitandi um tað.

Virksemið hjá fyrrverandi aðalskrivaranum Boutros-Boutros Ghali skal eisini kannast.

# 40 metrar høg alda

**Amerikanskir vísindamenn halda, at aldurnar vóru 40 metrar høgar, tá ein ódn herjaði Karibiska Havið í fjør**

ÓDNARVEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá tropiska ódnin Ivan herjaði í Karibiska Havinum í september í fjør, vístu aldumátararnir, at tær størstu aldurnar vóru 27 metrar høgar, men at tær løgdu seg, áðrenn tær komu inn á land.

So høgar aldur hava menn ikki mátað fyrr, men kortini halda amerikanskir vísindamenn, at í veruleikanum vóru aldurnar nógv hægri, at aldumátararnir vístu. Sambært vísindamonnunum eru teir vanligu aldumátararnir ikki førir fyri at máta sera høga aldu, og sjálvir halda teir, at aldurnar í ódnini Ivan kunnu hava verið upp í 40 metrar høgar.

- Vit halda, at tær størstu aldurnar kunnu hava verið upp í einar 40 metrar høgar, men vit hava ikki útgerð, sum kann vátta tað, sigur vísindamaðurin David Wang við BBC. Hann heldur tað vera umráðandi at útvega neyvari útgerð til aldumátingar, tí sambært veðurfrøðingunum kunnu vit rokna við harðligari veðri í komandi tíðum orsakað av veðurlagsbroytingunum.